# Pisur úr Hoydølum í eldin í European Business Games í morgin

**Í morgin skal verkætlanin hjá fýra nýklaktum pisum úr Hoydølum, GreenKit, sum umboðar Føroyar í European Business Games, í eldin**

EBG
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*



*Bólkurin úr Hoydølum, ið umboðar Føroyar í European Business Games við verkætlanini GreenKit. F.v. Laura Dahl, Unnur Danielsen, Ester Vang og Durita Hansen*

*Mynd: Dávur Winther*

Í hesum døgum verða seinastu fyrireikingarnar til European Business Games 2009 Finaluna í Keypmannahavn fingnar frá hondini.

Luttakararnir, sum eru úr 12 londum, harímillum Føroyum, hava hesa vikuna verið í Keypmannahavn, har tey hava luttikið á ymiskum workshoppum og hava havt møguleika fyri at leggja seinastu hondina á framløguna av teirra hugskoti og verkætlan.

Fýra nýklaktar pisur úr Studentaskúlanum í Hoydølum umboða Føroyar á leikunum.

## Málslingar mentu orkusparandi telduskipan

Tað var tann 20. mars í ár, at avdúkað varð, at tað var bólkurin handan GreenKit verkætlanina, sum hevði vunnið føroysku kappingina, og harvið eisini rættin at umboða Føroyar í finaluni í Keypmannahavn.

Í bólkinum eru tær fýra nýklaktu pisurnar úr Hoydølum, Unnur Danielsen, Durita Hansen, Ester Vang og Laura Dahl, sum, saman við læraranum Christian Ihlen, eru føroysku umboðini. Tær gingu allar í 3.E í Hoydølum, tá verkætlanin varð gjørd.

Tað sum kanska er serligt við hesi verkætlan er, at tær allar gingu á málsligu deild, og mentu eina telduskipan, sum kann sløkkja ljós/kontaktir í húsinum.

## Í eldin í morgin

Síðan sunnudagin hava luttakararnir úr øllum 12 londunum verið savnaðir í Danmark, har tey hava verið í gjøgnum eina rúgvismikla skrá við bæði teambuilding, workshoppum og vitjanum á granskingarstovum og handilsfyritøkum.

Í dag hava tey verið túr í søguliga partinum av Keypmannahavn, og í morgin verður so stóri dagurin, har tær skulu leggja verkætlanina og hugskotið fram fyri einum dómarapaneli, sum síðan skal viga allar verkætlanirnar og avgera, hvør verður vinnarin.

Klokkan 16 føroyska tíð í morgin verður so løtan, tá Bertel Haarder, undirvísing armálaráðharri skal avdúka vinnandi verkætlanina.

Finalan verður hildin í Finansrådets Hus, og føroyskar verkætlanir hava áður staðið seg sera væl í European Business Games.

Til allar familjur í Føroyum !

Komið og roynið skótalívið í fýra dagar á Selatrað, frá 2. til 5. juli



Báturin siglur millum Hósvík og Selatrað við fólki.
Um morgunin av Hósvík kl. 8, 9, 10, 11 og 12, og av Selatrað ein hálvan tíma seinni.
Um kvøldið av Selatrað kl. 16, 17, 18, 19 og 20 og av Hósvík ein hálvan tíma seinni.
Ímillum hesar tíðir ber til at tilkalla bátin á tlf. 448195 / 218195





Rógv við kano fram við strondini
Skjót við boga - eins og Robin Hood
Bygg eitt stórt torn við raftum
Renn gjøgnum forðabreytina
Fiska við tráðu umborð á einum skipi
Smíða jarnlutir á essini
Síg niður fram við stóra fossinum

Lesið meira á **www.skoti.fo**